# Dávur Winther



*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
Haldi jól í Klaksvík heima saman við familjuni. Abbasonurin kemur úr Århus, saman við mammu síni. Tað gleða vit okkum til. Tá ið børn eru í húsinum er alt meira jólaligt og hugnaligt – og tú hevur lættari við at vera barn, sum er tann meira hóskiligi leikluturin á jólum, har trúgvin uppá jólamannin, jólastjørnuna og Jesubarnið aftur verður sett uppá prøva.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
Dunna er tað mest vanliga – onkran av døgunum ræst eisini. Tollaksmessudag hava vit altíð ræstan fisk og spik – speril og røtur afturvið. Hetta er siður úr Fuglafirði, har vit stundum ótu ræstan fisk á miðdegi jólaaftan, sum nokk er tað upprunaliga rættara.

*Hvat er tað besta við jolum?*
At vera saman við familjuni - og ikki minst saman við børnunum. Tað legst afturat við smáum børnum, so tey eru við til at gera jólini serstøk. Hoyra góðan tónleik.

*Hvat er minni gott við jólum?*
Ov nógv át og at ein fær ilt í pengapungin. Paradoksið við at geva gávur í hópatali og ikki at duga betur at samskifta við vinir og kenningar og sjálvur at vera ein størri gáva í dagligdegnum. Soleiðis kundu jólini kanska eisini vart longur.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
Nei – men við tí kennskapi eg havi við m.a. Noregi, so kundi tað kanska verið hugnaligt at hildið jól norðalaga í Noregi við nógvum kava og brenni í peisuni ella brenniovninum.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
Jólasyrpuna hja Ólavi Øster til dagdvølju. Tá eg las niðri, sang eg nakrar ferðir Messias av Handel uppundir jól. Hetta sleppi eg at royna aftur í ár – Tað er rættur jólatónleikur, sum liggur leingi á.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Eina góða bók og hugna saman við kenningum og góðum fólki. At hugna sær við abbasoninum er serstakt. Annars vóni eg at jólini, saman við góðar hvíld kunnu leggja lunnar undir eina góða framtíð.



















